

*Gásadalur er vorðin ein væl umtókt bygd hjá fólki sum ynskja at byggja summarhús. Kommunan viðgerð nú eina heildarætlan fyri hetta økið*

# Skal Gásadalur mennast bert við summarhúsum?

**Áhugin fyri at byggja summarhús í Sørvágs kommunu tykist vera stórur. Hetta eru góð tíðindi fyri kommuna, men ger tað amstundis neyðugt hjá kommununi at síggja hetta málið í eini størri heild: Skal loyvi gevast til summarhús ella til heilárshús**

**BYGDAMENNING**
*Snorri Brend*

**Sørvágur:** Tað vísir seg, at fólk fegin ynskja at byggja summarhús í øllum bygdum í kommununi – tað er: Bæði í Sørvági, Bø, Mykinesi og síðst, men ikki minst í Gásadali.

Henda seinasta bygdin er vorðin serliga áhugaverd, nú tunnilin er um at verða liðugur, soleiðis at koyrast kann til hesa fjarskotnu bygdina nær tað skal vera.

Fyri Sørvágs kommunu – og serliga borgarstjóran Jákup Suna Lauritsen – eru hetta sjálvandi góð tíðindi.

Men hetta gevur kommununi samstundis aðrar trupulleikar, - ein støðutakan av meiri prinsipiellum slagi.

**FAKTA**

**Sørvágs kommuna**
Íbúgvarar: 1080 (1. januar 2005)
Bygdir: Sørvágur, Bøur, Gásadalur og Mykines



*Borgarstjórin, Jákup Suni Lauritsen: - Skulu summarhúsini byggjast inni í bygdini ella fyri ?*

- Spurningurin hjá kommununi er nevniliga, um hon skal geva loyvi til at byggja summarhús í Gásadali, har fólk bara fer at búgva í eina ávísa tíð av árinum?

- Og er nøkur meining í, at økja um talið av húsum í bygdini, samstundis sum ein kann ímynda sær, at tað við hesum verða fleiri hús sum standa myrk og tóm ein stóran part av árinum?

Júst hetta er Sørvágs kommuna vitandi um, og arbeiðir tí við hesum spurninginum, sum er rættiliga viðkomandi fyri alt økið.

**Fleiri grundøki**

Á fundi í bygdaráðnum fyri einum góðum mánaði síðani vóru tvey mál til viðgerðar í hesum sambandi.

Á fyrra førinum var tosað um tørvin á grundøkjum í síni heild. Her varð nevnt, at ætlanin er at útvega eini 50 grundøki aftrat í kommununi.

Av hesum skulu tey 30 verða í Sørvági, 10 í Bø og fimm økir aftrat í hvørjari av hinum báðum bygdunum, Gásadali og Mykinesi.

Á sama fundi var eisini málið um økir til summarhús fyri.

Henda viðgerðin bygdi á eitt skriv frá Jákup Suna Lauritsen har hann setur fram uppskot um, at farið verður undir at fyrireika summarhúsøkir í øllum fýra bygdunum í kommununi.

Bygdaráðið samtykti her at lata teknisku nevndina í kommununi arbeiða víðari við málinum. Seinni fer so nevndin at leggja fram eitt tilmæli til bygdaráðið í hesum málinum.

**Summar- ella heilárs hús**

Jákup Suni Lauritsen sigur við Sosialin, at nógvir spurningar eru tengdir av málinum um summarhúsini.

Tann fyrsti, og kanska avgerandi spurningurin er, hvar ein skal plasera hesi húsini, sum so stórur áhugi tykist vera fyri.

- Spurningurin er nevniliga, um vit skulu geva loyvi til at byggja summarhúsini millum tey verandi sethúsini inni í sjálvari bygdini, ella um vit skulu leggja tey í einum øki fyri seg, sigur hann.

Greitt er, at verður loyvi givið til bygging av slíkum summarhúsum, so fer tað eisini at skapa ávísar møguleikar fyri inntøkum í bygdunum í sambandi við ferðavinnuna, m.a. við túrum í náttúruni við ferðaleiðarum.

Spurningurin er eisini, um ikki kommunan sjálv kann fáa nakrar krónur í kommunukassan við t.d. einum ávísum leigugjaldi fyri hesi summarhúsini og hvørjar treytir, ið kommunan annars skal seta til hea byggingina.

Hesir spurningarnir og mangir aðrir verða tiknir fram, nú kommunan skal viðgera alt hetta málið í komandi tíð.

## Hvørt hús sína adressu

**Sørvágur:** Hesi seinnu árini hava alt fleiri og fleiri bygdir fingið sær bæði gøtunøvn og nummur á húsini, eftir áheitan frá myndugleikunum.

Í Sørvágs kommunu eru tey eisini komin áleiðis við hesum arbeiðinum, og á seinasta fundi varð hetta málið enn einaferð tikið fram.

Her varð sagt, at ikki bert Sørvágur, men eisini hinar bygdirnar í kommununi skulu áseta adressurnar hjá fólki.

Bygdaráðsfundurin samtykti, at tann eini bygdaráðslimurin, Sune Jacobsen skal arbeiða víðari við hesum adressum í Sørvági. Samstundis skal tekniska nevnd arbeiða við gøtunøvnunum í Bø, Gásadali og í Mykinesi.

**sb.**

## Toymisferðir kring allan heimin

**Missión:** Komandi summar bjóðar Heimamissiónin aftur fólki til toymisferðir til fimm ymisk lond.

Á henda hátt hava ung og vaksin møguleika at fara á eina heilt øðrvísi summarfrítíð enn annars.

Møguleiki verður nevniliga at fara við øðrum til so ymisk støð sum Vesturafrika, Ukraina, Ísrael og Kina. Møguliga verður ein ferð eisini gjørd til afrikanska landið Nigeria.

Á hesum støðum er gjørligt at uppliva og virka við í fongsulsarbeiðinum, arbeiðnum millum gøtubørn, hvussu ein fær bíbliur inn í Kina og hvussu ein gjøgnum ítrótt eisini kann vera í kristiligum arbeiði.

Saman við ferðaleiðarum verður farið til hesi støðini.

Luttakararnir gjalda sjálvir fyri ferð, kost og uppihald, og verður kostnaðurin millum 10 og 15.000 kr.

**sb.**

## Bakkaverjan skal styrkjast

**Skúvoy:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við at umvæla vegin frá bygdini og oman á lendingina.

Samstundis við hetta hevur ein gjørt fyrireikingar til styrkjan av sjálvari bakkaverjuni.

Landsverk upplýsir, at vegurin frá lendingi og niðan til neystini var liðugt gjørdur, og at arbeiðið við bakkaverjuni var farið í gongd.

Enn er ikki greitt, nær hetta arbeiðið verður liðugt. Játtanin til arbeiðið í Skúvoy er 550.000 kr. í ár.

**sb.**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!